KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	04.10.2018 kl. 17:30
Málnr.:	16/01208 Gerðabók
Nevndarlimir:	Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen.
Varalimir:	Óluva Klettskarð møtti fyri Steinbjørn O. Jacobsen
Ikki møtt:	
Onnur:	Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
97/18	18/01100-3	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Steinbjørn O. Jacobsen
98/18	16/01194-82	Val av limi í nevndina fyri Spinnaríið (fyri Eyðbjørn Poulsen)
99/18	17/00474-26	Bakkafrost – landstøð til alivirksemi í Klaksvík
100/18	18/00968-9	Hýruvognsloyvir lýst leys - 2018
101/18	18/00345-2	Umskipan av uttangarðsjørð millum matriklar á Norðoyri
102/18	18/01017-1	Byggisamtyktarbroyting á Fossum
103/18	18/00496-23	Fíggjarætlan 2019 - Klaksvíkar Býráð

97/18
18/01100-3 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Steinbjørn O. Jacobsen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	97/18	

Frágreiðing um málið:
Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, hevur boðað frá, at honum berst frá at møta á býráðsfundinum 4. oktober 2018. Næstvalda á valevnislistanum er Óluva Klettskarð.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1:
  Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 3:

Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslimin.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Býráðsins samtykt 04-10-2018
Einmælt samtykt at lata Óluvu Klettskarð taka sæti í býráðnum til fundin.

98/18
16/01194-82 Val av limi í nevndina fyri Spinnaríið (fyri Eyðbjørn Poulsen)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	98/18	

Frágreiðing um málið:
Kommunala umboðið og formaður í nevndini fyri sjálvsognarstovnin Grunnurin Spinnaríð, Eyðbjørn Poulsen, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann tekur seg úr nevndini við virknaði frá seinast í september mánaða 2018.

Sambært viðtøkunum verður grunnurin stjórnaður av eini 3-mannanevnd, har limirnir verða valdir fyri eitt fýra ára tíðarskeið. Nevndin verður vald soleiðis, at Klaksvíkar Handverkarafelag velur ein lim (Birgir Joensen), Ferðavinnan í Norðoyggjum velur ein lim (Elsa Poulsen), og Klaksvíkar kommuna velur ein lim. Víðari er ásett, at um so er, at ein nevndarlimur leggur frá sær, áðrenn valskeiðið er runnið, velur tann, ið hevur valt viðkomandi nevndarlim, beinan vegin ein nýggjan lim fyri tíðarskeiðið, ið eftir er.

Sostatt skal býráðið velja ein lim fyri Eyðjørn Poulsen. Tann, ið valdur verður, hevur so sæti í nevndini fram til 31. des. 2020, tá nýggj býráðsseta byrjar. Leggjast kann aftrat, at nevndarlimir kunnu verða afturvaldir.

Viðtøkurnar fyri grunnin eru ikki heilt greiðar viðv. skipan av nevnd, tá nýggir limir koma í nevndina "í ótíð". Í viðtøkunum er einans ásett, hvussu nevndin skipar seg, tá allir limir eru nývaldir (sum t.d. beint eftir eina nýbyrjaða býráðssetu). Tí er nærliggjandi at hugsa, at tá ein nýggjur limur verður valdur í nevndina, eigur nevndin á fyrstkomandi fundinum at skipa seg av nýggjum. Hesum stuðlar løgfrøðingur eisini, ið undirritaða hevur havt samskifti við.

Lógargrundarlag:
§§ 5 og 6 í viðtøkunum fyri grunnin.

Tilmæli:
Býráðið verður at velja annan lim í nevndina fyri Grunnin Spinnaríið.

Býráðsins samtykt 04-10-2018
Einmælt samtykt at velja Hera Ellingsgaard sum kommunalt umboð í nevndina fyri Grunnin Spinnaríið.

99/18
17/00474-26 Bakkafrost – landstøð til alivirksemi í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	17.09.2018	33/18	
2 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	99/18	

Frágreiðing um málið:
Bakkafrost hevur enn eina ferð vent sær til kommununa við umsókn um at fáa loyvi at brúka partar av vestara havnalagnum, frammanfyri Kryvjing, til landstøð. Talan er um eina atløgusíðu á uml. 50 metrar, sum skal girðast inni, soleiðis at øll ferðsla verður hildin burtur frá økinum, og í staðin verður atgongd til og frá bryggjukantinum og beinleiðis inn í húsið. ***Víst verður til viðheftu umsókn, uppskot 1***

Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Bakkafrost og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, har tey upplýstu, at um ikki økið kann verða varandi avbyrgt, fær Bakkafrost ikki umhvørvisgóðkenning og harvið heldur ikki loyvi at seta smolt út á aliøki A-12, sum er undir Kunoyarnesi.

Samband hevur verið millum kommununa og Bakkafrost um at finna eina loysn á trupulleikanum, men hetta hevur ikki eydnast.

Kommunan hevur í fleiri umførum víst á, at kravið um at læsa økið av ikki kann gangast á møti og hevur roynt at vísa á aðrar møguleikar fyri staðseting av landstøð. T.d. hevur verið víst á økir uttanfyri bygt øki á Grótrætt og Strond, men hesi hava ikki havt áhuga hjá Bakkafrost at arbeiða víðari við.

Eisini er roynd gjørd at finna onnur hølir á økinum við vestara havnalag, men hetta hevur heldur ikki borið á mál.

Umsitingin metir tað sera óheppið at byrgja økið á havnalagnum av. Havandi í huga, at annað virksemi er í økinum, sum javnan hevur tørv á ferðslu eftir bryggjuni.

Bakkafrost hevur boðið sær til at hava økið opið ávísar dagar t.d. á Norðoyastevnu, men hetta er bert talan um 2-3 dagar árliga.

Um so er, at umbønin frá Bakkafrost verður gingin á møti, verður mælt til, at hetta verður at galda í mesta lagi fyri trý ár, og at leigugjald verður ásett í mun til økið, sum verður avbyrgt. Samstundis skal Bakkafrost koma við ítøkiligari ætlan um, hvar og hvussu framtíðar landstøð skal skipast fyri aliøkið A-12.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri avvarðandi nevndir til umrøðu og støðutakan.

HaVN 17-09-2018
Ein meiriluti, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen og Óli M. Lassen, mælir til at geva fyribilsloyvi, ið ikki kann endurnýggjast, til økið frá 1. november 2018 til 1. mai 2021, treytað av, at økið verður opið, tá almenn tiltøk eru í kommununi við tilknýti til havnaøkið við landstøðina. Samstundis verður heitt á Bakkafrost um at koma við uppskoti til varandi loysn til landstød í aliøki A-12.

Ein minniluti, Atli S. Justinussen og Beinir Johannesen, mælir frá at geva loyvi við tí grundgeving, at havnaøkið/bryggjukant verður avbyrgt.

Nevndin vísir á, at møguligur leigusáttmáli fyri havnaøkið og bryggjukant, verður lagdur fyri nevnd til góðkenning, áðrenn undirskrivað verður.

Býráðsins samtykt 04-10-2018
Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Gunvá við Keldu um at beina málið aftur í nevnd. Tað fall við 4 atkvøðum fyri, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen, og 7 atkvøðum ímóti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein og Óluva Klettskarð.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá HaVN 17-09-2018; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen og Beinta Klakstein, og 5 atkvøðum ímóti, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Óluva Klettskarð.

100/18
18/00968-9 Hýruvognsloyvir lýst leys – 2018

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	17.09.2018	32/18	
2 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	100/18	

Frágreiðing um málið:
Eftir áheitan frá Havna- og vinnunevndini eru trý hýruvognsloyvir lýst leys at søkja. Nú freistin er farin, er bert ein umsókn komin.

Vinnan meinar ikki, at fleiri loyvir skulu latast. Tí at teir, sum liva av vinnuni, hava ikki so nógv at gera, og at um kommunan letur fleiri loyvir, er ikki møguleiki fyri rímiligari inntøku hjá teimum vinnurekandi.
Tí mælir vinnan til, at onki nýtt loyvi verður latið. Vinnan er ikki samd um, um Standard Hýruvognsreglugerðin skal avtakast.

Løgfrøðingur kommununnar hevur ráðført í samband við ætlanina at fáa eina hýruvognsstød í kommununi. Hann hevur gjørt eitt uppskot til avtøku av nevndu reglugerð, sum verður klárt til nevndarfundin hjá Havna- og vinnunevndini.

Har Standard Hýruvognsreglugerðin ikki er sett í gildi, er ferðslulógin galdandi.

Lógargrundarlag:
Standard Hýruvognsreglugerðin

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri nevndina at taka støðu, um Standard Hýruvognsreglugerðin skal avtakast fyri Klaksvíkar kommunu. Um ikki, verður nevndin at taka støðu til, um talið á hýruvognsloyvum skal minka frá 10 til 8 loyvir, og um umsøkjarin skal fáa hýruvognsloyvi.

HaVN 17-09-2018
Nevndin mælir til, at Standard Hýruvognsreglugerðin verður avtikin fyri Klaksvíkar kommunu.

Býráðsins samtykt 04-10-2018
Atkvøtt varð um tilmælið frá HaVN 17-09-2018; tað var samtykt við 10 atkvøðum fyri, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Óluva Klettskarð, og 1atkvøðu ímóti, Gunvá við Keldu.

101/18
18/00345-2 Umskipan av uttangarðsjørð millum matriklar á Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.04.2018	32/18	
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	11.06.2018	65/18	
3 Norðoyrarnevndin	28.08.2018	4/18	
4 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.09.2018	95/18	
5 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	101/18	

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av mat. nr. 8e og 13 á Norðoyri ynskja at umskipa millum ognirnar, soleiðis at uttangarðsparturin (11. gl.) hjá matr. nr. 8e í Hagapartinum Fløturnar verður fluttur til matr. nr. 13, sum frammanundan eigur 1 gl. í sama hagaparti.
Við umskipanini verður uttangarðsjørðin loyst frá matr. nr. 8e, sum byggisamtyktarliga er útlagt til blandað íbúðar- og vinnuendamál, og í staðin løgd til matr. nr. 13, sum liggur í landbúnaðarøki.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Mælt verður til at viðmæla umsóknini.
Av tí at Norðoyrarnevndin ikki hevur fund fyrrenn 29. mai 2018, verður lagt upp til, at málið verður avgreitt av býráðnum hetta umfarið, og eftirfylgjandi latið Norðoyrarnevndini til kunningar.

UBN 16-04-2018
Nevndin mælir til at leggja málið fyri Norðoyranevndina fyrst.

UBN 11-06-2018
Nevndin beinir málið fyri Norðoyanevndina.

NoN 28-08-2018
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TU dagf. 09.04.2018.

UBN 17-09-2018
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Norðoyrarnevndini 28-08-2018.

Býráðsins samtykt 04-10-2018
Tilmælið frá NoN 28-08-2018 og UBN 17-09-2018 einmælt samtykt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

102/18
18/01017-1 Byggisamtyktarbroyting á Fossum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.09.2018	91/18	
2 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	102/18	

Frágreiðing um málið:
Vísandi til samtykt býráðsins frá 21.06.2018 um skipan av útstykking á Fossum verður við hesum lagt fyri nevnd og býráð neyðug broyting í økismarkum. – (Økisásetingarnar verða óbroyttar)

Økispartar A2, C1 og D39 áðrenn broyting:

Økispartar A2 og D39 eftir broyting – tillagað til samtyktu útstykkingarætlanina (C1 dettur burtur):



Samtykt útstykkingarætlan – (nýggju byggisamtyktarøkismarkini innteknað við reyðum)



Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til, at farið verður undir tilgongdina við broyting av økismarkunum innan almennu byggisamtyktina á Fossum sum lýst omanfyri.

UBN 17-09-2018
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-09-2018.

Býráðsins samtykt 04-10-2018
Tilmælið frá UBN 17-09-2018 einmælt samtykt.

103/18
18/00496-23 Fíggjarætlan 2019 - Klaksvíkar Býráð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	01.10.2018	100/18	
2 Havna- og Vinnunevndin	01.10.2018	34/18	
3 Mentanarnevndin	01.10.2018	60/18	
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	01.10.2018	41/18	
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	01.10.2018	17/18	
6 Tekniska Nevnd	01.10.2018	55/18	
7 Fíggjarnevndin	01.10.2018	89/18	
8 Klaksvíkar Býráð	04.10.2018	103/18	

Frágreiðing um málið:
Í samband við býráðsins viðgerð á temadegi har karmurin fyri rakstrinum hjá Klaksvíkar kommunu í fíggjarætlan 2019 skal viðgerast, hevur umsitingin gjøgnumgingið øll rakstrarstøð. Gjørd er ein meting um rakstrarroknskapin 2018, somuleiðis ein uppgerð yvir vøksturin í teimum sáttmálabundnu lønunum og eisini eitt yvirlit yvir tær útreiðslur, ið beinleiðis eru tengdar at samtyktum hjá býráðnum.

Klaksvíkar kommuna		Temafundur I Fíggjarætlan 2019 Rakstur										
		Roknsk.	F.ætlan I	Eyka-játtanir v.m	F.ætlan II	Meir/ minni nýtsla	Meting Roknsk.	Lønar-framskr.	Aðrar útreiðslur/ inntøkur	F.ætlan	2018 I 2019 I	2018 II 2019 I
	1.000 kr	2017	2018	2018	2018	2018	2018	2019	2019	2019	2019	2019
§1	Kommunal fyrisiting	21.129	20.572	0	20.572	442	21.016	941	-34	21.923	1.349	1.349
§2	Almanna- og heilsumál	67.100	72.698	50	72.748	-161	72.587	2.943	263	75.793	3.095	3.045
§3	Børn og ung	36.320	39.029	1.848	40.877	300	41.177	1.118	-1.651	40.645	1.615	-233
§4	Útbúgving og gransking	9.649	9.624	0	9.624	0	9.624	70	0	9.695	70	70
§5	Mentan og frítíð	18.017	11.801	567	12.368	-201	12.167	108	384	12.660	858	291
§6	Teknisk mál	19.390	20.104	-160	19.944	330	20.274	464	252	20.991	886	1.046
§7	Kommunalt virki	16.067	12.666	220	12.886	-624	12.262	145	279	12.686	20	-200
	Rakstrarútreiðslur	**187.673**	**186.494**	**2.525**	**189.019**	**86**	**189.107**	**5.789**	**-507**	**194.393**	**7.893**	**5.368**
	Rentustuðul	3.728	4.000	0	4.000	0	3.600	0	0	3.600	-400	-400
	Rentuútreiðslur	9.299	4.400	0	4.400	0	4.000	0	0	4.000	-400	-400
	Rakstrarútreiðslur tils.	**200.700**	**194.894**	**2.525**	**197.419**	**86**	**196.707**	**5.789**	**-507**	**201.993**	**7.093**	**4.568**
	Inntøkur	**-267.867**	**-270.000**	**0**	**-270.000**	**-6.200**	**-276.370**	**0**	**-375**	**-276.675**	**-5.800**	**-5.800**
	Rakstrarúrslit	**-67.167**	**-75.106**	**2.525**	**-72.581**	**-6.114**	**-79.663**	**5.789**	**-882**	**-74.682**	**1.293**	**-1.232**

Kolonnurnar longst til høgru skulu lesast sum broyting í mun til upprunaligu og dagførdu fíggjarætlan.

Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2018 vóru rakstrarútreiðslurnar, áðrenn rentustuðul og rentuútreiðslur, settar til 186,5 mió. kr. Samtyktar eru eykajáttanir fyri 2,5 mió. kr. Tann dagførda ætlanin er tí 189,0 mió. kr. Ein gjøgnumgongd av rakstrinum og ein meting um nýtsluna restina av árinum vísir, at rakstrarútreiðslurnar koma at vera innan hendan karm.

Raksturin í 2017, frádrigið stuðulsjáttan á 6 mió. kr. til Mentanarhúsið, var 181,7 mió. kr. Um raksturin 2018 verður 189,1 mió. kr., er vøksturin 7,4 mió. kr. ella 4,1%.

Samlaðu lønarframskrivingarnar fyri 2019 eru 5,8 mió. kr.; frádrigið 0,5 mió. kr. í tillagingum geva hesar framskrivingar 5,3 mió. kr. í meirútreiðslum. Hetta gevur ein rakstur í 2019 á 194,4 mió. kr.

Lønframskrivingin merkir sostatt ein øktan rakstur á 2,8%. Um lønarframskrivingin verður sett í mun til tær samlaðu lønarútreiðslurnar, er talan um ein vøkstur á 3,4% í miðal.
Samanumtikið svarar raksturin á 194,4 mió. kr. til ein vøkstur á 7,9 mió. kr. meir enn upprunaliga fíggjarætlan 2018 og 5,4 mió. kr. meir enn tann dagførda ætlanin 2018.

Á niðanfyristandandi talvu eru inntøkurnar útgreinaðar.

Klaksvíkar kommuna	Temafundur I Fíggjarætlan 2019 Rakstur										
	Roknsk.	F.ætlan I	Eyka-játtanir v.m	F.ætlan II	Meir/ minni nýtsla	Meting Roknsk.	Lønar-framskr.	Aðrar útreiðslur/ inntøkur	F.ætlan	2018 I 2019 I	2018 II 2019 I
	Yvirlit yvir inntøkur										
Kommunuskattur	-200.427	-208.000	0	-208.000	0	-208.000		-5.200	-213.200	0	-5.200
Húsaleiguskattur	0	0	0	0	0	-170		0	-100	0	-100
Felagsskattur	-21.195	-16.000	0	-16.000	-5.500	-21.500		5.000	-16.500	0	-500
Skattur av eftirlønargjøld	-34.398	-35.133	0	-35.133	-700	-35.833		-657	-36.490	0	-1.357
Flyting vegna DIS, FAS og	-11.847	-10.867	0	-10.867	0	-10.867		482	-10.385	0	482
Inntøkur tilsamans	-267.867	-270.000	0	-270.000	-6.200	-276.370	0	-375	-276.675	0	-6.675

Gongdin seinastu fimm árini vísir, at persónskatturin hevur havt ein árligan miðal vøkstur á 6,7%. Í inniverandi ári er talan um ein vøkstur á umleið 4%. Tí kann ein framskriving á 2,5% sýnast nakað varislig. Vøksturin er minkandi, og tí eigur hædd at verða tikin fyri hesi gongd. Við hesi framskriving verður roknað við persónskatti á 213,2 mió. kr.
Felagsskatturin er mettur til 16,5 mió. kr., hetta er umleið 5 mió. kr. minni enn fyrsta uppgerð frá Taks yvir felagsskattin í ár. Vøksturin í felagsskattinum hevur verið sera stórur seinastu árini, og tí kann ikki roknast við, at hendan gongdin heldur fram. Ilt er at meta um felagsskattin. Eitt boð frá umsitingini er, at við "vanligari" búskapargongd eigur felagsskatturin at vera umleið 12-14 mió. kr.

Skattur av eftirlønargjøldum er settur til 36,5 mió. kr. Í samband við FAS, DIS o.a. frádráttir er sett 10,4 mió. kr. Hesar upphæddir hevur Fíggjarmálaráðið mett í samband við fíggjarætlaninar hjá kommununum fyri komandi ár.

Tilsamans verða inntøkurnar umleið 277 mió. kr. í 2019 samanborið við 276 mió. kr. í 2018. Gongdin higartil í ár er, at persónskatturin hevur havt ein vøkstur á 4%, og um hesin vøkstur heldur fram restina av árinum, verður persónskatturin 208 mió. kr., tað sum er mett um í fíggjarætlanini fyri 2018. Forskattingin av eftirlønum er nakað hægri, og tí verður mett ein møgulig meirinntøka á 1 mió. kr.

Tað samlaða rakstrarúrslitið í 2019 verður við hesum fortreytum 74,7 mió. kr. samanborið við 79,7 mió. kr. í 2018. Í báðum førum eru stuðulsjáttanir til mentantarhúsið o.a. ikki íroknað.

// Hjálagt: Framløga og yvirlit yvir rakstur og rakstrarstøð.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Kommunulógin og roknskaparverk fyri kommunur

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Framskriving av lønum og øðrum tillagingum vísir ein øktan rakstur á 5,3 mió. kr.

<u>Tilmæli:</u>
Verður hervið lagt fyri á felagsnevndarfundi hjá Klaksvíkar Býráð til viðgerðar og støðutakan.

<u>UBN 01-10-2018</u>
Ein meiriluti, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen og Signhild V. Johannesen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss. *(Sí talvu undir FíN)*

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Beinir Johannesen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm. *(Sí talvu undir FíN)*

HaVN 01-10-2018
Ein meiriluti, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen og Óli M. Lassen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss. *(Sí talvu undir FíN)*

Ein minniluti, Atli S. Justinussen og Beinir Johannesen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm. *(Sí talvu undir FíN)*

MeN 01-10-2018
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Beinta Klakstein og Óli M. Lassen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss. *(Sí talvu undir FíN)*

Ein minniluti, Atli S. Justinussen og Gunvá við Keldu, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm. *(Sí talvu undir FíN)*

B&U 01-10-2018
Ein meiriluti, Beinta Klakstein, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss. *(Sí talvu undir FíN)*

Ein minniluti, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm. *(Sí talvu undir FíN)*

E&B 01-10-2018
Ein meiriluti, Beinta Klakstein, Kristian Eli Zachariasen og Signhild V. Johannesen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss. *(Sí talvu undir FíN)*

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm. *(Sí talvu undir FíN)*

TN 01-10-2018
Ein meiriluti, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig og Beinta Klakstein, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss. *(Sí talvu undir FíN)*

Ein minniluti, Atli S. Justinussen og Beinir Johannesen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm. *(Sí talvu undir FíN)*

FíN 01-10-2018
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Tummas J. Lervig og Signhild V. Johannesen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019 við einari tillaging á 1,8 mió. kr. til økt dagstovnapláss.

	Uppskot frá umsitingini, 27-09-2018	Temaf. I
	Æ2019 (tkr.)	Æ2019 (tkr.)
Inntøkur	276.675	273.793
Rakstur	194.393	196.193
	82.282	77.600
Rentustuðul	3.600	3.600
Rentur	4.000	4.000
Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir	74.682	70.000

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, mælir til at samtykkja uppskot til fíggjarætlan dagf. 27. sept. 2019, og at kostnaðurin av øktum dagstovnaplássum verður fíggjaður innan verandi karm.

	Uppskot frá umsitingini, 27-09-2018	Temaf. I
	Æ2019 (tkr.)	Æ2019 (tkr.)
Inntøkur	276.675	273.793
Rakstur	194.393	194.393
	82.282	79.400
Rentustuðul	3.600	3.600
Rentur	4.000	4.000
Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir	74.682	71.800

<u>Býráðsins samtykt 04-10-2018</u>
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen og Beinta Klakstein, tekur undir við meirilutunum í UBN, HaVN, MeN, B&U, E&B, TN og FíN 01-10-2018.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Óluva Klettskarð, tekur undir við minnilutunum í UBN, HaVN, MeN, B&U, E&B, TN og FíN 01-10-2018.